Janus og HB leingja

Janus M. Joensen, sum síðani 1999 hevur verið fastur fúsur á besta HB-liðnum, hevur gjørt av leingja sáttmálan við felagið við tveimum árum afturat

Janus er ein av leikarunum, sum er uppvaksin í HB, og felagnum dylja tey ikki fyri, at tey eru fegin um, at sterki bakkurin eisini komandi árini verður at síggja á besta liðnum.

-jm

Útisetarnir byrja aftur

Leygardagin byrjaði danska flogbóltslandskappingin aftur, og aftur í ár eru fleiri føroyingar millum teirar, sum taka lut. Holte IF hevur seinnu árini verið eitt av føroysku útisetafeløgunum, og í so máta er árið í ár einki undantak.

Soleiðis vóru bæði Ragnar í Haraldsstovu og Bárður B. Mikkelsen á liðnum hjá Holte, nú danska kappingin byrjaði, og hartil er væntandi, at Steinar Eirikstoft eisini verður at síggja í felagnum um ikki alt ov langa tíð.

Talan er um eitt nýtt lið, sum Holte í løtuni er í ferð við at byggja upp, og hetta kom eisini til sjóndar, tá liðið í fyrsta dystinum hitti SK Århus. Við settúrslitunum, 25-13, 25-16 og 25-19, gjørdist talan um greiðan sigur til heimaliðið, men sambært heimasíðu felagsins er hetta tó ikki nakað, sum fær felagið av valdu kósini.

Komandi dysturin hjá Holte verður komandi mikukvøld móti DHG Odense. Tann dysturin verður vístur á rásini, DK4, sum í vetur fer at senda beinleiðis flogbólt hvørja viku.

-jm

HB-GÍ 3-3 (2-1)

Høpisleyst í storminum

Tað verður ikki grundað á fótbóltsspælið, at áskoðararnir fara at minnast dystin millum HB og GÍ. Heldur verður tað veðrið, og so nýggi HB-málverjiin, sum tosið fer at snúgva seg um, tá fólk í framtíðina lata tankarnar leita til fortíðina

Hóast teir í knappan tíma vóru 11 móti 10, so eydnaðist ikki gøtumonnum at vinna HB
savnsmynd

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Útvarpsmaðurin segði tað so rámandi sunnukvøldið, tá hann skuldi taka saman um dystin í Gundadali millum HB og GÍ. »Tað besta við dystinum var, at hann endaði«, og tað sigur nokk tað allar mesta av tí, sum var at siga um dystin.

Ikki tí. Bæði HB og GÍ hava seinastu nógvu áriini verið ímyndin av nakað av tí besta, sum føroyskur fótbóltur hevur at bjóða, og tó gøtumenn ikki eru so ovarligir í ár, sum teir ofta hava verið, so hevur liðið til tíðir borið um, at teir framvegis duga at spæla fótbólt.

Vindurin og HB trýstu

Men størsti trupulleikin sunnudagin mundi vera, at veðrið als ikki var til fótbóltsspæl. Gjørt varð kortini av, at dysturin skuldi spælast, og so var bara at fara ígongd.

Vindurin, sum sjáldan hevur verið meira í Gundadali, var fyri steðgin við HB, og hetta førdi eisini eitt støðugt trýst oman móti GÍ málinum við sær. Fleiri hornaspørk spurdust burturúr, og við einum av hesum eydnaðist Jákupi á Borg og vindinum í felag at beina bóltin beinleiðis í kassan.

Um miðjan hálvleikin økti Hallur Danielsen til 2-0, tá GÍ verjan ikki fekk ruddað rættiliga burtur, og so mundu tey flestu halda, at meistararnir enn einaferð vóru á sigurskós.

Reytt til málverjan

Men kósin varð skeiklað nakað stutt fyri steðgin. Bárður Johannesen í HB-málinum misti snøgt sagt høvdið, tá hann og Adam Paluszek lupu eftir einum høgum bólti. HB-málverjin átti fríspark, men í hevnisøku sparkaði hann eftir GÍ-áleyparanum, og so var tað march-ordri til HB-málverjan.

Hetta gav HB liðnum nakrar trupulleikar. Ikki minst úti á beinkinum, har gerast skuldi av, hvør nýggi maðurin í málinum skuldi vera. Pól N. Joensen var á beinkinum, men hann var ikki heilt væl fyri, og endin av øllum bleiv, at Heine Fernandez setti seg sjálvan í málið. Hann hevði annars undan vikuskiftinum boðað frá, at hann ikki skuldi aftur á vøllin hetta kappingarárið, men sum kunnugt, so eru støður til fyri at broytast, og soleiðis varð eisini hesaferð.

Og so lá betri fyri hjá GÍ. Við nýggja »málverjanum« í huga fekk GÍ betri hug at royna seg frameftir, og tó fyri steðgin eydnaðist Hans Paula Petersen at minka um munin, tá Heine ikki fekk vart fyri einum skoti frá gøtumanninum.

GÍ fekk stig

Eftir steðgin ressaðist HB tó nakað. Eina løtu var vindurin ikki heilt so nógvur, og hóast HB var í numeriskum undirluta, so vóru teir leikliga við yvirlutan, og tað eydnaðist teimum eisini at økja til 3-1, tá Heðin av Lakjuni slapp at gera sær dælt av misskiljing í GÍ-verjuni.

Móti endanum fekk GÍ tó aftur fatur um rætta endan, og við tveimum málum megnaðu teir at fáa stig burturúr. Ein skuldi annars hildið, at ein av dygdunum hjá HB-málverjanum var at sparka bóltin, men ta einu ferðina eydnaðist honum tó ikki at fáa útspark nóg langt niðan, og so kundi Poul Arni Jacobsen smekka til. Og lítla løtu seinni gjørdist 3-3, tá Adam Paluszek góði upp undir málinum kundi stúta GÍ upp á javnt.

Hampuligt hjá báðum

Soleiðis fingu báðir partar eitt sindur úr dystinum. Fyri GÍ mundi tað hóast eisini kennast hampuliga gott, at teir á útivølli megnaðu at fáa stig móti meistarunum. Nakað sum annars bert KÍ hevur megnað í ár.

Og hóast heimaárið soleiðis ikki endaði við sigri, so er ein javnleikur betri enn tap. Og serliga við 10 monnum mundi tey í HB tí kenna, sum var dagurin ikki heilt spiltur.

Nú kann HB so gera seg til seinastu ferðina á árinum. Hon gongur til Runavíkar, og í viðførinum fara HB'arnir tá at hava FM-steypið. Hetta verður tó seinastu ferð, at steypið verður tikið úr húsinum, tí eftir handanina hesaferð eigur HB nevnliga steypið til ognar, og so noyðast tey hjá Føroya Bjór helst enn einaferð at bíleggja nýggjar silvurlutir.

FAKTA UM DYSTIN

HB-GÍ 3-3 (2-1)
1-0: Jákup á Borg, 7.
2-0: Hallur Danielsen, 26.
2-1: Hans Pauli Petersen, 44.
3-1: Heðin á Lakjuni, 65.
3-2: Poul Arni Jacobsen, 82.
3-3: Adam Paluszek, 87.
HB: Bárður Johannesen – Hallur Danielsen, Jan Dam, Símun Eliasen, Janus M. Joensen – Jákup á Borg (Rókur Jespersen, 30.), Kári Nielsen, Rúni Nolsøe, Rasmus Nolsøe (Heine Fernandez, 35.) – Rógvi Jacobsen (Hendrik Rubeksen, 88.), Heðin á Lakjuni
RK: Bárður Johannesen, 35.
GÍ: Hallur Hansen – Poul Ennigarð, Kaj Ennigarð, Atli Gregersen, Hanus Jacobsen – Jónreið Dalheim (Poul Andrias Jacobsen, 60.), Símun Louis Jacobsen, Áslakur Reinert Petersen (Poul Arni Jacobsen, 46.), Hans Pauli Petersen – Súni Olsen, Adam Paluszek.
GK: Áslakur Reinert Petersen, 31., Atli Gregersen, 41., Hanus Jacobsen, 73., Kaj Ennigarð, 89., Poul Ennigarð, 90.
Dómari: Suni Johansen

Dómararnir gjørt sponsoravtalu

Føroya Bjór og LM-handilin fara í vetur at stuðla hondbóltsdómarunum

HONDBÓLTUR
tíðindaskriv

Fríggjadagin skrivaðu Dómarafelagið og Føroya Bjór undir sponsorsáttmála, sum er galdandi fyri komandi vetur. Avtalan inniber, at føroyski hondbóltsdómararnir í vetur allir fara at døma í eins búnum, sum Føroya Bjór hevur latið, og sum sjálvandi koma at bera væl kenda Jollymerkið á troyggjunum.

Eyðun Samuelsen, sum vegna dómarafelagið hevur havt avtaluna um hendi, fegnast um stuðulin, sum felagið við hesum fingið. Ikki minst tí hetta lættir nakað um hjá dómarunum, sum soleiðis ikki nýtast at hugsa um búnarnar.

– Tað er sjálvandi eitt pluss fyri okkum, at vit á hendan hátt kunnu lætta um hjá dómarunum, og tað gevur eisini eitt positivt signal úteftir, at tað soleiðis eru stuðlar, sum sýna dømingini ans, sigur hann.

Umframt Føroya Bjór, hevur dómarafelagið eisini gjørt avtalu við LM-handilin, sum somuleiðis er partur av avtaluni, og bera LM-logoið at vera sjónligt á brókunum hjá hondbóltsdómarunum.

Eyðun Samuelsen vegna dómarafelagið og Jákup á Borg vegna Føroya Bjór geva hørjum øðrum hondina, nú nýggja sponsoravtalan er veruleiki

Trý mál á muni

Tvøramenn liggja best fyri, men tað skal bara heilt lítið til, um sandoyingar skulu yvirhála á seinasta leikdegi

2. DEILD
Jákup Mørk

Sandoyingar gjørdu sína skyldu, tá teir vunnu greiðan heimasigur á KÍ
mynd: Álvur Haraldsen

Bert eitt umfar er eftir í næstbestu mansdeildini í fótbólti, og spenningurin fær valla verið størri enn tað sama í løtuni.

Undan hesum umfarinum vóru TB og B71 á odda, og tað eru tey framvegis.. TB hevði á pappírinum sera trupla uppgávu, tá teir skuldu til Hvalbiar at takast við granna rnar úr Royn. Ein dystur, sum Royn helst sær sum ein hin sørsti á árinum, og tað eydnaðist eisini at geva TB ein hvøkk, tá Gisli Sveinbjørnsson legði vertirnar á odda.

Ghanesiski Emmanuel Larby megnaði tó at javna fyri TB, og so settu uppflytingarkandidatarnir seg á dystin. Búi Mortensen og Daniel Nyarko øktu hvør sínu megin steðgin, og tó at Rúni Thomsen fekk minkað um munin fyri TB, so syrgdi Larby við enn einum máli fyri, at TB framvegis er á uppflytingarkós.

Hjá B71 ráddi fyrst og fremst um at vinna dystin móti KÍ, og harnæst helst at vinna so greitt, sum tað yvir høvur var gjørligt. Partvíst eydnaðist hetta eisini, tí við 4-0 sigrinum var ongantíð nakar sum helst ivi um, hvar stigini skuldu enda.

Men tað kann væl vísa seg, at sigurin hjá sandoyingunum var í minna lagi, tí hóast greiða sigurin, so er støðan framvegis tann, at TB eru trý mál betri enn B71 á stigatalvuni.

Tað hevur annars onkra tíð verið tosað um, at TB kortini er betri enn B71, tí meðan B71 vann heimadystin móti TB við 3-1, vann TB ikki minni enn 6-2, tá B71 vitjaði á Sevmýru.

Her eru reglurnar tó tær, at málini í hesum dystunum ikki hava tað heilt stóra at siga. Tá innanhýsis uppgerðirnar verða gjørdar upp, eru tað bara stigini, sum telja, og her standa liðini jøvn, so í verandi støðu er tað samlaði málmunurin, sum ger av, hvat liðið er betri.,

Og so kann tó kortini sigast, at málini í innanhýsis uppgerðunum hava sín týdning. Í øllum førum munnu tey í B71 iðra seg um, at tapið á Sevmýru skuldi gerast somikið greitt. Var talan t.d. um eitt 4-2 tap, vildi B71 í dag verið eitt mál betri, men tá er so talan um hypotesur, sum hvørki TB ella B71 fáa gjørt nakað við. Her ræður fyrst og fremst um at vinna – og helst stórt – tá seinasta umfarið er á skránni komandi vikuskifti. Tá skal B71 vitja hjá B36, sum leygardagin vissaði sær enn eitt ár í næstbestu deildini, meðan TB á heimavølli fær vitjan av VB, sum longu er flutt niður.

Bronsa á Argjum

Júst B36 og VB leiktu annars sínamillum leygardagin, og tá gjørdust omanflytandi staðfestingar veruleiki. VB var annars liðið, sum byrjaði betri, men B36 – og serliga Tummas Hans Rubeksen – endaðu tó omaná. Ungi leikarin gjørdi ikki færri enn fýra av málunum hjá árstalsfelagnum, sum við sigrinum økti munin niður til níggjunda plássið upp í seks stig, samstundis sum tað endaliga gjørdist greitt, at næstbesta VB liðið í komandi kappingarári skal spæla fótbólt í triðju deild.

Í Leirvík helt LÍF fram við góðu úrtøkuni, eftir at teir annars máttu steðga eitt lítið sindur á, tá Tb fyri stuttum fekk javnleik. Hesaferð vitjaði FS Vágar, og tað var heilt skjótt, at tað gjørdist greitt, at LÍF veruliga er væl fri. Niels Paul Justinussen, Sølvi Vatnhamar og Petur Sjúrðarberg skutu eitt mál hvør fyri steðgin, áðrenn Sølvi í seinna hálvleiki kundi staðfesta sigurin, sum lyfti leirvíkingarnar upp á fjórða plássið í deildini.

Seinasti dysturin var á Argjum, har Sumba vitjaði. Sumbingar komu á odda, men AB vann dystin við trimum málum móti ongum, men hóast bara trý stig eru upp til tey ovastu, so mugu tey í AB helst ásanna, at tað so ikki verður í ár, at tey fáa møguleikan at spæla seg upp í bestu deildina. Málmunrin hjá AB er nevnliga somikið nógv verri enn hjá TB og B71, at tað skulu onkur heilt óvanlig úrslit til, um argjamenn skulu vinna seg longur upp. So kunnu teir iðra seg um, at tað ikki eydnaðist at fáa størri úrtøku burtur úr heimadystunum móti eitt nú Royn, LÍF og B36, sum allir vórðu tapir. Tað fær felagið so ikki gjørt nakað við nú, men eitt bronsupláss í deildini er tó besta úrslitið í felagssøguni, so heilt misnøgd munnu tey kortini ikki vera, tá alt kemur til alt.

LÍF-FS Vágar 4-0(3-0)
1-0 Niels Pauli Justinussen
2-0 Sølvi Vatnhamar
3-0 Petur Sjúrðaberg
4-0 Sølvi Vatnhamar

B71-KÍ 4-0(1-0)
1-0 Eli Hentze br.
2-0 Jónsvein Thomsen
3-0 Jónsvein Thomsen
4-0 Clayton Soares

Royn-TB 2-4(1-2)
1-0 Gisli Sveinbjørnsson
1-1 Emmanuel Larby
1-2 Búi Mortensen
1-3 Daniel Nyarko
2-3 Rúni Thomsen
2-4 Emmanuel Larby

VB-B36 2-5(2-1)
0-1: Tummas H. Rubeksen
1-1: Birgir Jørgensen
2-1: Sigmund Mikkelsen
2-2: Tummas H.Rubeksen
2-3: Tummas H. Rubeksen
2-4: Áki Mørk
2-5: Tummas H. Rubeksen

AB-Sumba 3-1 (2-1)
0-1: Rene Thomsen
1-1: Eyðun Samuelsen
2-1: Eyðun Samuelsen
3-1: Nikolaj Erikasen

Men tað var tó ikki nóg mikið at vinna seg heilt fram, tí við 4-2 sigri í Hvalba helt TB fast um sína støðu, nú bert eitt umfar er eftir at leika
Mynd: Áki Bertholdsen

Landsliðsspælararnir fingu fult

Feløgini hjá Jón Róa Jacobsen, Johan Byrial Hansen og teimum trimum á Amager vunnu øll í vikuskiftinum

1. DEILD DANMARK
Jóannes Hansen

Vikuskiftið var gott hjá feløgunum í næstbestu donsku deildini, sum hava føroyskar landsliðsspælarar á liðnum. Fremad Amager og Frem vunnu á heimavølli, og Horsens vann á útivølli.

Aftur hesa ferð var bara ein av trimum landsliðsspælarum á liðnum hjá Fremad Amager. Jann Ingi Petersen og Hjalgrím Elttør vóru als ikki úttiknir. Andrew av Fløtum var á vølllinum allar 90 minuttirnar. 1.177 áskoðarar vóru í Sundby Idrætspark, og tað er eitt høgt tal, tá ið havt verður í huga, at talan er um næstbesta deildina. B93 helt tørn, inntil tað restaðu áðan átjan minuttir. Í síðsta minutti staðfesti Thomas Lundby 2-0 heimasigurin. Hann hevði eisini skorað fyrra málið.

Lagið er gott í Valby. Frem hevur vunnið tær seinastu ferðirnar, og hesa ferð vóru 1.488 eygnavitni, tá ið teir á heimavølli vunnu 1-0 móti SønderjyskE, sum hevur stórar ætlanir um aftur at flyta upp í bestu deildina, og sum hevur nýtt nógvar pengar fyri at brynja seg væl. Jón Rói Jacobsen var enn eina ferð tryggur málverji hjá Frem, sum skoraði einasta málið, tá ið tað restaðu tjúgu minuttir.

Longu leygardagin vóru Horsens og Johan Byrial Hansen á Fyn og spældu móti botnliðnum, Dalum. Horsens vann 3-2, og harvið eru teir á triðja plássinum. Frem er næstovast, og HIK er framvegis fremst. Hesa ferð megnaðu teir kortini ikki meiri enn málleysan javnleik á heimavølli, tá ið Fredericia vitjaði.

Vejle er framvegis frammarlaga, men hesa ferð taptu teir 3-1 á heimavølli móti Køge.